Bjarni Kárason Petersen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um lóg um foreldramyndugleika og ættleiðingarlógina, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Ætlar landsstýrismaðurin at leggja fyri Løgtingið uppskot um broyting í løgtingslóg um foreldramyndugleika, soleiðis at eitt barn hevur tvey foreldur við føðing?

2. Ætlar landsstýrismaðurin at leggja fyri Løgtingið uppskot um broyting í ættleiðingarlógini, soleiðis at tað verður lættari hjá eini sammóður at ættleiða barn, sum makin hevur borið?

Viðmerkingar:
Í frágreiðing Løgmans á Ólavsøku 2020 á s. 61 undir løglistanum stendur:

"Í samgonguskjalinum er ásett, at foreldramyndugleikalógin skal endurskoðast. Farið er undir arbeiðið við at endurskoða lóg um foreldramyndugleika og samveru. Nú málsøkið persóns-familju- og arvarættur er yvirtikið, ber til hjá okkum at gera broytingar í og laga lóggávuna á økinum til serlig føroysk viðurskifti."

Í dag eru samkynd foreldur fyri mismuni í mun til foreldramyndugleika. Undir verandi lóg hevur bert foreldur, ið ber barnið, foreldramyndugleika við føðing, og hevur rættindi sum einligur, men hitt foreldrið hevur ongan løgfrøðiligan foreldramyndugleika við hartil hoyrandi rættindum við føðing. Hetta ávirkar familjurnar á nógvum mótum, serliga tá ið tað viðvíkur arvi og sosialum tænastum, so sum rættindi til barsilsútgjald, systkinafrádrátt v.m.

Harafturat er ein av góðkenningartreytunum fyri ættleiðing, at tey, ið vilja ættleiða saman, skulu hava búð saman í minsta lagi 2 ½ ár. Sostatt er ikki gjørligt hjá sammóðir ella -faðir at fáa foreldramyndugleika fyrr enn eftir at hava búð saman í 2½ ár, og hava tey ikki rætt til eitt nú barsilsútgjald, hóast tey rinda inn til barsilsskipanina sum skattagjaldarar, eins og øll onnur. Hetta málsøkið liggur tó undir Umhvørvis- og Vinnumálaráðnum, men inngongur natúrliga í málið, sum verður spurt um, og hevur undirritaði sett avvarðandi landsstýrismanni skrivligan fyrispurning um hetta.

Á Løgtingi, 17. september 2020

Bjarni Kárason Petersen